## DAGSINS MEINING

# Virksemið er tryggjað...

Fyrrapartin ígjár frættist, at loysn er funnin fyri virkini hjá Sandoy Seafood í Skopun og á Sandi, sum hava merkt sviðan frá teimum lágu prísunum á frystum upsavørum. Eftir tí, sum higartil er komið fram, hevur Sandoy Seafood gjørt eina avtalu um skuldina hjá felagnum, soleiðis at felagið aftur verið rakstrarført.

Hetta mugu vit fegnast um, tí gavst felagið við virkseminum í Sandoynni, hevði óivað verið tungt at fingið virksemið uppaftur. Avleiðingin hevði kanska verið, at trupla støðan í sunnaru helvt í Suðuroynni hevði flutt seg norður um Suðuroyarfjørð til Sandoynna.

Støðan í Sandoynni var trupul, eftir at flakavinnan varð umskipað miðskeiðis í 90-árunum, men ein ætlan var medvirkandi til, at virksemið á virkjunum á Sandi og í Skopun varð tikið uppaftur. Men Sandoyarætlanin var bara ein partur av loysnini, tí hin parturin - fólk, sum høvdu áræði og tordu at fara undir virksemi av nýggjum - skuldi eisini til. Og uttan bæði drivnar og hugflogsríkar vinnulívsmenn í Delta Seafood á Tvøroyri hevði Sandoyarætlanin neyvan verðið burðardygg.

Sandoyarætlanin er nógv umrødd í samband við støðuna í sunnaru helvt í Suðuroynni, serliga í Vági. Í stuttum skal sigast, at Sandoyarætlanin varð ein samtykt á løgtingið, sum setti av tríggjar milliónir krónur til at fara undir virksemi á teimum báðum virkjunum í Skopun á Sandi. (Heta var kortini ikki nóg mikið at fáa virkini løggildað, men stigtakararnir útvegaðu meiri pening).

Men um ein sandoyarætlan - ella ein suðuroyarætlan - við nøkrum milliónum krónum í játtan til flakavirksemi í sunnaru helvt í Suðuroynni er rætta loysnin, er tann stóri spurningurin. Í øllum førum seta vit stórt spurnartekin við hesar tankar, tí, sum skilst, er støðan í sunnaru helvt í Suðuroynni nógv truplari enn sum so, tí kreppan har suðuri er nógv meiri bygnaðarlig, ella strukturell.

Tað merkir kortini ikki, at politiski myndugleikin ikki skal vera við til at loysa støðuna har suðuri - eisini við peningi. Men tað mugu fyrst og fremst vera vinnulívsfólk í sunnaru helvt í Suðuroy - ella fólk aðrastaðni, um teir neyðugu leiðararnir og íleggjararnir ikki finnast á staðnum - sum taka tey vinnuligi stigini fyri at fá gongd á aftur vinnulívið í hesum landspartinum, sum hevur átt ein týðandi leiklut í føroyska búskapinum. Tað almenna skal skapa nakrar betri karmar og somu fyritreytir sum vinnuliívið aðrastaðni, men intiativið mugu lokalar kreftir taka.

Lagt varð fyri við at siga, at tað er eydnast at fáa virksemið í Sandoy Seafood tryggjað við nøkrum avtalum og nýggjum kapitali. Uttan at gera nakrar samanberingar, so slepst ikki undan at gera sær nakrar tankar um støðuna og spyrja, hvussu tað ber til, at líknandi ikki ber til í sunnaru helvt í Suðuroynni. Har finst gott fólk - bæði á sjógvi og á landi - og hesar góðu kreftir mugu taka stig og í felag virka fyri at fáa gongd á aftur vinnulívið, so tað aftur verður trivnaður í hesum partinum í landinum.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Eidesgaard frá sum løgmaður?

**Thomas Arabo**
*Javnaðarflokkurin*




Okkara fjølmiðlafólk royna at reka uppundir, at Løgmaður ikki burdi stillað upp til Fólkatingsval. Sjálvandi eigur hann tað. Hetta er gomul siðvenja, og kemst hon av, at floksformaður og løgmaður altíð hava verið sami persónur. Sjálvandi skal floksformaðurin leiða ein flokk inn í eitthvørt valstríð, og tað, at hann í okkara føri er Løgmaður er eingin vansi, m.a. tí at valskeiðini ikki eru samanfallandi. Sjálvandi situr Jóannes Eidesgaard tryggur sum Løgmaður fyri tí, um hann stillar upp til fólkatingsval.

Loysingarflokkarnir hava mangan sagt, at einki ber til uttan fullveldi. Tað bar ikki til at yvirtaka ráevnini í undirgrundini uttan loysing. Tað bar ikki til at fáa Vaktar og Bjargingartænastuna uttan loysing o.s.fr. Men tað bar til við góðum politiskum handalagi og treiskni. Nú siga teir, at tað ber ikki til at fáa víðkaðar uttanríkisheimildir uttan fullveldi. Sjálvandi ber tað til! Tað er ein spurningur um sjálvsálit.

Vit í Javnaðarflokkinum síggja ljóst uppá at koma framá á sjálvstýrisleið, sjálvt um vit mangan mugu arbeiða í mótbrekku, har mótstøðan løgið nokk ikki kemur frá Sambandsflokkinum, men frá teimum ið siga seg vilja koma fram á sjálvstýrisleið.

Síðsta skrímslið, ið hálað verður úr skjáttunni er ES spurningurin. Sjálvandi skulu øll ES viðurskiftini kannast, men tað verður fyrst og fremst ein spurningur til komandi løgtingsval, meðan eingin panikkur eigur at verða í tí málinum í løtuni. Okkara ES viðurskifti hanga neyvt saman við, hvat hendir í Noregi og Íslandi, og alt bendir á, at tað verður eitt nýtt Løgting, ið kemur at taka støðu til tað málið.

Í Javnaðarflokkinum eru nógv góð fólk, ið bjóða seg fram sum fólkatingsvalevni, og hjá okkum eru tað úrslitini, ið telja og ikki talið av yvirskriftum í fjølmiðlunum, og so sanniliga ikki, hvussu nógv uppskot man hevur liggjandi í eini skuffu!

Summi valevni marknaðarføra seg uppá, at vilja verða fólkatingslimur burturav. Tað er nú einaferð so, at summi megna ikki meir enn at loysa eina uppgávu í senn, meðan onnur klára væl og virðiliga fleiri. Soleiðis eru vit so ymisk.

# Fólkatingsval

**Gerhard Lognberg**
*løgtingsmaður*

Nú fólkatingsval er fyri durum, og valevnini úr øllum flokkunum bjóða seg fram, við teimum bestu loysnunum fyri okkara kæra Føroya land, og ivist eg ikki í, at øll vilja tað besta.

Eg havi lagt merki til, at nógv verður tosað um ES.

Út frá míni persónligu meining er ES nakað, sum vit ikki skulu blíva partur av, men heldur royna at gera avtalur. Sum limir høvdu vit mist allan okkara identitet.

Um so verður, at ein ES grundlóg verður til endans, so má henda undir ongum




umstøðum trýstast yvir høvdið á okkum.

Føroyar eiga og skulu verða uttan fyri ES.

Farið á val og velji eitt av valevnum hjá Javnaðarflokkinum.

# Javnaðarflokkurin velur evruna sum valuta!

**Birgir Mohr**
*Sandi*




Størsta mistak, sum vit føroyingar kundu gjørt, var at valt sjálvstøðugan føroyskan valuta – føroyska krónu, sum Miðflokkurin ætlar tað, tí tað gjørdi Ísland.

Rokningina fyri tað mistakið hevur íslendska fólkið goldið í dýrum, og fleiri ferðir vórðu nullini strikað, fyri at íslendska krónan kundi vera ein króna.

Hetta kostaði íslendingum nógv. Tað tók 40 ár at fóta sær búskaparliga, og fleiri generatiónir av íslendingum fóru í grøvina fátækir, hóast tey høvdu livað eitt virkið, langt og skilagott lív.

Tann avgerðin hevur einki at gera við búskaparliga viðvindin hjá okkara brøðratjóð fyri norð-vestan í dag, og helst fer eisini Ísland sum frá líður yvir til evruna.

Vit føroyingar hava eitt at gera, um Danmark fer frá donsku krónuna til evruna, og tað er at vit gera tað sama. Tað er tó ein møguleiki fyri, at vit kanska skuldu farið yvir til evruna undan dønum, um hini norðurlondini gera tað og Stóra Bretland eisini.

Men ong føroyska krónu, tað tænir ongum endamáli. Tað siga vit í Javnaðarflokkinum. Gott val!

Veljið Javnaðarflokkin.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard
toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.